## Federer vann aftur Wimbledon

Sunnudagin var finalan í Wimbledon tenniskappingini spæld, og fjórða árið á rað var tað Roger Federer úr Sveis, sum vann kappingina. Hesaferð var finalan ímóti spanska Rafael Nadal, sum hevur vunnið fleiri dystir ímóti Federer. Nadal vann eisini eitt sett í dystinum, men annars var tað Federer, sum var omaná. Settini endaðu 6-0, 7-5, 6-7 og 6-3. Hjá kvinnunum var tað Amelie Mauresmo úr Fraklandi, sum vann kappingina. Hon er fyrsta franska kvinna í 81 ár, sum vinnur tenniskappingina í Wimbledon.

## Símun spælir týðandi dyst í morgin

Íslendska felagið Keflavík, har føroyski landsliðsspælarin Símun Samuelsen spælir við, skal í annaðkvøld spæla týðandi dyst í íslendsku landskappingini. Dysturin er á heimavølli í móti ÍBV av Vestmannaoyggjunum. Keflavík og ÍBV liggja ájavnt við 11 stigum í Landsbankadeildini, og liðið, sum vinnur dystin, kann draga eitt sindur frá botninum. ÍA liggur aftast við 9 stigum, síðani hava Keflavík, ÍBV og Breiðablik 11 stig, so tað er tætt millum aftastu liðini.

# Tey næstbestu eru betri enn tey bestu

**Bæði í Klaksvík og í Havnini settu heimaliðini uppflytaraevni upp á pláss, og so eydnaðist tað leirvíkingum rættuliga at koma upp í part aftur**



*TB vann aftur hetta vikuskiftið. Hesaferð var tað ímóti SÍ á heimavølli*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

1. DEILD

*Jóannes Hansen*

Eftir at teir í fleiri vikur hava verið niðanfyri uppflytingar strikuna, eru leirvíkingar eftir 16. umfar aftur á uppflytingarplássi. Tað eru teir, eftir at teir sjálvir vunnu stórsigur á heimavølli móti VB/Sumba, og tí at AB rudduliga snávaði í Klaksvík.

B71 heldur tørn um oddasessin. Hesa ferð var uppgávan hjá teimum lættari, enn teir sjálvir høvdu vónað. Royn møtti ikki upp á Sandi. Sambært B71 heimasíðuni bóðu hvalbingar týskvøldið um, at uppgerðin varð flutt frá leygardegnum og til sunnudagin. Tað varð játtað av øllum myndugleikum. Leygarkvøldið boðaðu teir í Royn frá, at tað ikki bar teimum til at manna lið. Harvið vinnur B71 øll stigini.

Ein onnur avleiðing verður, at B71 ikki skal til Hvalbiar í 25. og triði síðsta umfari, sum er á skránni 30. september. Tá skal Royn norður til Sands.

Hvalbingar vóru í Lítlu Dímun leygardagin. Tað varð sagt at vera orsøkin til, at tað tann dagin ikki bar teimum til at fara norður um at spæla fótbólt. At dysturin ikki varð spældur er sjálvandi harmuligt, og sovorðið eigur ikki at koma fyri. Men tað er ivaleyst uppaftur torførari at manna lið, enn tað plagar at vera, tá ið tað skal gerast mitt í summarfrítíðini.

17. og síðsta umfarið undan summarsteðginum verður á skránni nú leygardagin. Skráin sigur, at Royn tá skal spæla á heimavølli móti TB. Hinir dystirnir eru FS Vágar04-AB, SÍ-HB, VB/Sumba-B71 og LÍF-KÍ.

Á Jóansøku skuldu VB/Sumba og Royn havt spælt. Dysturin varð útsettur, og hann er ikki spældur enn.

### KÍ-AB 3-0

Argjamenn vóru merkiliga tamir. Tað bar teimum næstan ikki til at spæla seg til møguleikar. KÍ var stinnari í verjupartinum, har Jan Andreasen og Ovi Nysted vóru í miðverjuni, og teir høvdu størri tyngd í álopspartinum.

Øll trý málini komu innan stórt korter kring steðgin. Jan Andreasen legði stutt undan steðginum heimaliðið framum, tá ið hann eftir horna og út frá fluktaði í málið. Erling Fles stútaði tveir minuttir eftir steðgin til 2-0 eftir frísparksinnlegg, og tá ið ein tími var farin var tað altíð vandamikli Jósup Henriksen, sum varð spældur leysur og skoraði.

Í 2. hálvleiki hevði KÍ fleiri aðrar møguleikar. Gunnar á Steig, sum er klaksvíkingur og ferðast til Eiðis at venja, vardi AB málið, og hann var besti maður á vitjandi liðnum. Magnus Poulsen, sum plagar at verja AB málið, sigst vera við B36 á Europa Cup ferð í Letlandi.

### TB-SÍ 3-2

Serliga í 2. hálvleiki var tað hendingarríkt á Sevmýri. Tá sóu áskoðararnir fýra mál, og teir vóru eisini vitni til, at tveir spælarar – ein frá hvørjum partinum – vórðu riknir av vøllinum. Í báðum førunum var orsøkin tvey gul kort. Tann fyrri var Kim Roest úr TB. Tað var í 66. minutti, tá ið SÍ var á odda 2-1, og tann seinni var Jón Nielsen úr SÍ. Tað var í 77. minutti, tá ið støðan var tann sama, sum hon var, tá ið SÍ misti ein mann.

Olivur Abrahamsen legði við langskoti umvegis stólpan TB framum beinanvegin. Tveir minuttir eftir steðgin javnaði Jón Nielsen. Teir vóru tveir sørvingar, sum gjørdust leysir innanfyri TB verjuna. Tá ið knappur tími var farin, legði Messias Perreira SÍ framum. Við høvdinum stýrdi hann bóltinum í málið eftir horna.

Tað restaðu tíggju minuttir, tá ið Kaj Roest eftir innlegg og eitt sindur av aftur og fram javnaði til 2-2. Tíggju sekund restaðu av teimum fýra minuttunum, sum dómarin hevði lagt afturat, tá ið Kaj Roest við langskoti, sum tók í stólpan, áðrenn bólturin fór í málið, syrgdi fyri, at øll stigini vóru eftir á Sevmýri. Hetta var fjórða ferðin á rað, at TB fekk øll trý stigini.

### HB-FS Vágar04

Teir í Sandavági hava spælt tríggjar ferðir, síðani venjarin varð skiftur út. Enn hevur tað ikki eydnast teimum at fáa stig.

Hesa ferð vitjaði FSV04 teir næstbestu í HB. Fyrsta hálva tíman royndi FSV04 at halda høga leikferð, og tá var eitt sindur torført hjá HB veteranunum at fylgja við, men so gekk tað fyri seg eftir teirra treytum, og tá var eingin slingur í valsinum hjá heimaliðnum.

Eftir innlegg úr høgru legði Hendrik Rubeksen beinanvegin HB framum. Tíggju minuttir seinni javnaði Sonny Johansen, tá ið hann var fyrstur á eftir skotroynd á stólpan.

Innanfyri stórt korter kring steðgin fekk HB trý mál og avgjørdi harvið. Uni Arge var meistari fyri tveimum teimum fyrru. Í báðum førum var uppskriftin, at hann mitt fyri megnaði at fara frá ikki so sannførandi miðverjuni. Í fyrra førinum sneiddi veteranurin framvið Trygva Askham, áðrenn hann trillaði bóltin í málið.

Bárður Mortansson, sum er HB spælari í summarfrítíðini frá lesnaði í Skotlandi, økti til 4-1, tá ið hann sendi fríspark upp undir samankomingina.

### LÍF-VB/Sumba 11-0

Tá ið LÍF 10. juni hevði tapt á heimavølli móti AB, sá tað svart út at røkka málinum, sum er at flyta upp. Síðani hevur LÍF vunnið allar fýra ferðirnar við málmuninum 18-0! Góða gongdin sæst aftur á støðutalvuni, tí nú er LÍF næstovast.

Hesa ferð var talan bara um avgreiðsluspurning. Marlon Kjærbo og Janus Kjærbo vóru veteranar á VB/Sumba liðnum, sum annars var mannað við ungum monnum úr 22 árum og niðureftir.

Bárður á Lakjuni og Adrian Joensen skoraði fýra ferðir í part fyri LÍF. Merkisvert var tað, at trý tey fyrstu málini vórðu stútað. Bárður átti høvdið á tveimum teimum fyrstu eftir innlegg úr høgru frá Andriasi Lava Olsen, og Magnus Skoralíð átti tað triðja, eftir at Bárður á Lakjuni hevði sent innfyri úr vinstru.

Adrian Joensen varð skrásettur fyri tvey mál undan steðginum. Ì fyrra førinum var tað eftir innlegg úr vinstru, og í seinna førinum var tað eftir at skotroynd hjá Símuni Waag Høgnesen hevði rakt í hælin á unga manninum. Magnus Skoralíð syrgdi við frísparki úr 22 metrum fyri 6-0 dygst undan steðginum.

Eftir steðgin var framvegis einvegis ferðsla. At ferðin fór niður, og at LÍF ikki tók seg saman at vera mál, fyrrenn eitt korter var farið, vórðu teir neyvan kliktir niður á av væl nøgdu áskoðarunum.